## IMF kann hjálpa

Týska stjórnin er til reiðar at góðtaka, at Grikkaland kann fáa hjálp frá Altjóða Gjaldoyragrunninum IMF, um landið fær tørv á tí. Ein talsmaður fyri týsku stjórnina sigur við fjølmiðlarnar, at sum er hevur Grikkaland ikki tørv á hjálp frá IMF. Men skuldi tað hent, at støðan versnar, og at grikska stjórnin vendir sær til IMF um hjálp, fer Týskland ikki at seta seg upp ímóti tí. Fleiri hava kravt, at Týskland skal hjálpa Grikkalandi, men kanningar vísa, at flestu týskarar eru ímóti tí.



## Sermerktar fingrabøkur til tey smáu

Bókadeildin gevur nú út tvær sermerktar bøkur við fingradukkum, har onnur dukkan er ein hundahvølpur og hin ein mús. Við at trýsta fingurin í dukkuna kunnu børnini spæla djórini, samstundis sum hetta eisini stimbrar teirra fínmotrorikk. Bókin Lítli hundahvølpurin er um ein hundahølp, sum rennur undan mammu síni, tí hann vil ikki í bað. Hin bókin Lítla músin er um músina, sum fyrstu ferð fer at spæla við eina kanin. Bøkurnar eru 10 síður úr hørðum pappi.

# Hundar kappast á altjóða støði

**- Eg eri vaksin upp við áhuga fyri seyði og seyðahundum. Og nú gleði eg meg bara at sleppa við til hundakappingina leygardagin, sigur Ronnie Samuelsen úr Klaksvík**



*Tað tekur drúgva tíð og krevur gott tol at venja upp ein seyðahund.*
*- Eg havi altíð havt áhuga fyri seyði og seyðahundum, sigur Ronnie Samuelsen úr Klaksvík. Fyrr spældi hann fótbólt. Nú brúkar hann nógva tíð saman við seyðahundi sínum*
*Mynd: Tanja Sørensen/ Durita Simonsen*

HUNDAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Viðareiði:** Ronnie er kendur frá mongum fótbóltsdystum við EB/Streymi.

Síðani hann legði fótbóltsskógvarnar á hillina, hevur eitt annað áhugamál stungið seg upp av álvara: Seyðahundar.

Hetta hevur hann ikki av ongum, tí í barnaheimi hansara í Haldórsvík var seyðahald eitt evni, ið nógv varð tosað um.

- Pápi mín hevði nógvan seyð, og soleiðis fekk eg eisini henda áhugan, greiðir hann frá.

Týsdagin hittu vit hann norðuri á Viðareiði, har hann vandi hund sín, til ta stóru kappingina, sum verður í morgin.

Hetta verður triðja ferðin at hann er við í hesi kappingini á Viðareiði.

- Tað er altíð spennandi at kappast ímóti hinum. Her sær ein hvat ein hevur vant, og ein hevur haraftrat nakað at venja fram ímóti.

- So eg gleði meg til leygardagin, greiðir Ronnie Samuelsen frá. Sjálvur brúkar hann mest hundarnar sjálvur og sum eitt amboð, tá hann er á fjalli.

### Tað sosiala

Luttøkan við tær undanfarnu kappingarnar hevur verið góð.

Hesaferð kann væntast, at áhugin verður væl størri. Hetta kemst av tveimum spenandi orsøkum:

Í fyrsta lagi fer ein hundaserfrøðingur úr Skotlandi at døma í kappingini. Talan er um Bobby Dalziel, sum hevur vunnið sær bæði heiður og nógvar virðislønir í kappingum í heimlandi sínum.

Í øðrum lagi stendur vinnaranum av kappingini í boði at luttaka í eini altjóða kapping fyri seyðahundar, sum verður hildin í Fraklandi í summar.

Júst hesi bæði tingini heldur Ronnie hava stóran týdning fyri kappingina. Hetta fer uttan iva at gera sítt til, at støðið fer at hækka og at menn og kvinnur fara at gera sær størri ómak at venja hundar sínar.

Nú er jú ikki nóg mikið at fáa eina góða plasering í Føroyum, tí møguleiki verður hereftir at kappast ímóti seyðahundum á altjóða støði.

- Fyri meg hevur tað ikki so nógv at siga, hvørja plasering eg fái í kappingini. Eg eri við av áhuga og fyri tann sosiala partin, sigur Ronnie Samuelsen.

# Meiri endurnýtsla í Runavík

**Leygardin kl. 11 letur ein nýggjur endurnýtsluhandil upp í Runavík. Tað er Blái Krossur, sum frammanundan hevur ein endurnýtsluhandil í Havn, sum nú eisini kemur at reka hendan handilin**

ENDURNÝTSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Runavík:** Endurnýtsluhandilin heldur til í nýístandsettum hølum, har sum tógvhandlin og lampubúðin hjá Mathias Davidsen fyrr helt til.

Talan er tó ikki um ein heilt nýggjan handil. Grundarlagið undir hesari Blákrossbúðini er fyrrverandi Sudanbúðin á Glyvrum, sum Mission Afrika hevur rikið í nøkur ár.

- Mission Afrika ynskti at gevast við endurnýtsluhandlinum, og spurdi tí, um Blái Krossur var áhugaður í at yvirtaka hann, sigur Hjalmar Hansen, aðalskrivari hjá Bláa Krossi.

Henda áheitan hóskaði stak væl inn ætlanirnar hjá Bláa Krossi og tí var avgjørt at yvirtaka Sudanbúðina. Tó er avgjørt at flyta handilin, og verður hann eisini opin hvønn dag.

Endurnýtsluhandilin í Runavík ber eisini navnið Blákrossbúðin, eins og í Havn. Úrvalið kemur mest at vera klæðir, men eisini smærri brúkslutir, smykkur og leikutoy verður selt í endurnýtsluhandlinum.

Í samband við at Blákrossbúðin í Runavík, letur upp leygardagin, verður skipað fyri móttøku kl. 11.

Her fara Hjalmar Hansen, aðalskrivari at bjóða vælkomin, eins og Magnus Rasmussen, borgarstjóri í Runavíkar Kommunu ber fram heilsan. Eisini verður sangframførsla við Emil Thorleifssyni.

Handilin verður opin mánadag til fríggjadag frá 13 til 17.30, og leygardag frá 10 til 13.

